


*Enn eina ferð tekur B68 ímóti EB/Streymi á Svangaskarði, men í kvøld er tað í fyrru hálvfinalu í steypakappingini. Hin hálvfinalan er í Fuglafirði millum ÍF og 07 Vestur*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

# Má bera ella bresta

**LØGMANSSTEYPIÐ** Favorittarnir fullu, tá hálvfinaluliðini høvdu aðalroyndir sunnudagin og mánakvøldið, so nú verður spennandi at síggja, hvat hendir í kvøld

Hilmar Jan Hansen

Tá B68 sunnudagin á Toftum vann 1-0 á EB/Streymi og 07 Vestur mánakvøldið í Fuglafirði vann 2-1 á ÍF, vóru hetta nokk ikki akkurát tey úrslitini, tey flestu høvdu roknað við. Hetta vóru í báðum førum dystir í Vodafonedeildini, sum góvu trý týdningarmikil stig, men samstundis vóru hetta aðalroyndir undan fyrru hálvfinalunum í kappingini um Løgmanssteypið, sum verða í kvøld.

Og hálvfinalurnar bjóða júst somu dystir, tí klokkan 18.30 byrjar dysturin í Fuglafirði millum ÍF og 07 Vestur, og klokkan 19 spæla B68 og EB/Streymur á Toftum. So er spurningurin, um úrslitini verða tey somu, sum í landskappingardystunum, ella um tey bæði liðini, tey flestu rokna sum favorittar, fara at standa seg betur í kvøld.

At ÍF tveir heimadystir á rað hevur tapt fyri teimum báðum lægstu liðunum í Vodafonedeildini, er sjálvandi ikki gott, men hinvegin er liðið hjá 07 Vestur er kanska ikki so vánaligt, sum plássið á stigatalvuni sigur. Tí verður tað annaðhvørt greiður ÍF-sigur ella ein javnur og opin dystur.

Hóast EB/Streymur við sínum drúgvu steyparoyndum má sigast at vera favorittur á Svangaskarði í kvøld, er B68-liðið við at fóta sær av álvara. Og havandi í huga, at B68 saktans kundi vunnið nógv meira enn bara 1-0 sunnudagin, má roknast við einum púra opnum dysti, har alt kann henda.

Seinnu hálvfinalurnar verða spældar týsdagin 14.juni, og sjálv finalan í kappingini um Løgmanssteypið verður í Klaksvík fríggjadagin 5. august.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# Besta álop og besta verja

**FÓTBÓLTUR** Fyrsti veruligi toppdysturin hetta kappingarárið verður í Runavík sunnudagin, tá NSÍ við besta álopinum tekur ímóti B36 við bestu verjuni

Hilmar Jan Hansen

Av teimum fimm dystunum í níggjunda umfarinum, sum samstundis endar fyrsta triðingin av landskappingini, er tað dysturin við Løkin í Runavík, ið er nógv tann mest áhugaverdi. Har tekur NSÍ ímóti B36, og tá hetta eru tey bæði fremstu liðini, er hetta fyrsti veruligi toppdysturin í ár.

Samstundis er hetta ein uppgerð millum besta álop og bestu verju, tí NSÍ hevur skotið ikki færri enn 25 mál í teimum átta undanfarnu dystunum og hevur +16 í málúrtøku, meðan B36 í líka nógvum dystum bara seks ferðir hevur latið bóltin fara í egið mál.

Alt skuldi talað fyri einum veruligum brakdysti millum hesi bæði liðini, tí við til søguna hoyrir eisini, at B36 hevur næstbesta álopið og NSÍ eina av bestu verjunum. Verður ein vinnari í hesum dystinum, er tað liðið samstundis eisini vinnari av fyrsta triðinginum, men endar dysturin við javnleiki, kann Víkingur smoyggja sær framum, um liðið vinnur sín dyst mánakvøldið.

## Hinir dystirnir

Gamli klassikarin í Gundadali millum HB og KÍ er ein skuggi av sær sjálvum, tí liðini berjast um miðjuna á stigatalvuni, nú HB er komið illa frá byrjan og KÍ steðgað upp eftir framúr góða byrjan.

Í Sørvági tekur 07 Vestur ímóti B68. Liðini hava bæði átta stig í part, men annars eru 15 mál ímillum tey, tí 07 Vestur hevur so vánaliga málúrtøku. So fæst at síggja, hvør munurin er á vøllinum.

Munur skuldi í øllum førum verið á liðunum, ið spæla við Margáir, tí hóast tað ikki hevur gingist eftir vild hjá EB/Streymi, hevur liðið 10 stig fleiri enn B71, sum bara hevur trý stig á sínum aftasta plássi. Tey komu á útivølli, men verða neyvan tvífaldað sunnudagin...

Síðsti dysturin er mánakvøldið, tá Víkingur og ÍF spæla grannadyst í Sarpugerði við ymiskum fortreytum, tí Víkingur liggur framvið heilt har frammi, meðan ÍF er beint oman fyri niðurflytingarstrikuna.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

# EB/Streymur avsannar alt

**FÓTBÓLTUR** Hóast Dimmalætting skrivar, at EB/Streymur er í fíggjarligum óføri og spælarar ikki fáa løn, avsannar formaðurin í felagnum alt

Uni Holm Johannesen

Onga løn og EB/Streymur í fíggjarligum óføri, skrivaði Dimmalætting millum annað fyrr í vikuni og sipaði til, at fótbóltsfelagið EB/Streymur ikki hevur goldið sínum spælarum løn í ár.

– Hatta passar ikki. Dimmalætting hevur fingið nógv burtur úr ongum, sigur Rólant Højsted, formaður í EB/Streymi, sum vísir aftur skuldsetingunum um, at felagið er í fíggjarligum óføri. Allir spælararnir hava ikki fingið sína løn, men tað er ikki soleiðis, at vandi er á ferð.

Spurdur um lønarviðurskiftini, ásannar Rólant Højsted, at summir spælarar ikki hava fingið alt útgoldið, tí felagið hevur lítla og onga inntøku hesa tíðina.

– Men tað er ikki óvanligt, og soleiðis hevur eisini verið undanfarna árini. Millum annað fáa vit pengarnar frá altjóða luttøkuni í fjør á kontuna í summar. Tað er ein sannroynd, at tað er tungt og strævið at reka eitt fótbóltsfelag. Tað vita spælararnir av. Teir vita eisini, at allir spælararnir fáa sínar pengar í summar, sigur formaðurin.

## Dimma undrast

Blaðstjórin á Dimmalætting, Árni Gregersen, sigur við heimasíðuna hjá Norðlýsinum, at hann ikki ordiliga skilir, hvussu Rólant Højsted nú skal siga seg avsanna nakað, sum hevur staðið í Dimmalætting, tí tvørturímóti váttar hann tað, blaðið skrivaði:

– Vit royndu fleiri ferðir at fáa fatur á formanninum í EB/Streymi, men hesin vildi ikki taka telefonina. Vit ringdu enntá til næstformannin fyri at fáa vátta, at tað vóru røttu telefonnummur, vit ringdu til, sigur blaðstjórin, ið ikki dugir at síggja, at formaðurin í EB/Streymi avsannar nakað.

– Í veruleikanum váttar hann, at felagið skyldar spælarum løn, men sigur samstundis, at teir skulu fáa løn seinni í árinum.

*uni@sosialurin.fo*

## Dystir um vikuskiftið:

**LØGMANSSTEYPIÐ**

19/05 18.30 ÍF-07 Vestur
19/05 19.00 B68-EB/Streymur

**VODAFONEDEILDIN**

22/05 15.00 NSÍ-B36
22/05 15.00 07 Vestur-B68
22/05 15.00 EB/Streymur-B71
22/05 15.00 HB-KÍ
23/05 19.00 Víkingur-ÍF

**1. DEILD MENN**

21/05 13.00 07 Vestur II-HB II
21/05 15.00 TB-NSÍ II
21/05 15.00 FC Hoyvík-EB/Str. II
21/05 15.30 Víkingur II-AB
21/05 17.00 Skála-FC Suðuroy

**1. DEILD KVINNUR**

22/05 13.00 KÍ-AB
22/05 15.00 Skála-B36
22/05 17.15 HB-Víkingur

**Føroyska Vodafonedeildin** vodafone deildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | B36 | 8 | 5 | 3 | 0 | 18 | 6 | +12 | 18 |
| 2 | NSÍ | 8 | 5 | 2 | 1 | 25 | 9 | +16 | 17 |
| 3 | Víkingur | 8 | 5 | 2 | 1 | 17 | 8 | +9 | 17 |
| 4 | EB/Streymur | 8 | 4 | 1 | 3 | 13 | 8 | +5 | 13 |
| 5 | KÍ | 8 | 3 | 1 | 4 | 14 | 11 | +3 | 10 |
| 6 | HB | 8 | 3 | 1 | 4 | 13 | 13 | 0 | 10 |
| 7 | B68 | 8 | 2 | 2 | 4 | 13 | 12 | +1 | 8 |
| 8 | ÍF | 8 | 2 | 2 | 4 | 11 | 14 | -3 | 8 |
| 9 | 07 Vestur | 8 | 2 | 2 | 4 | 8 | 24 | -16 | 8 |
| 10 | B71 | 8 | 1 | 0 | 7 | 5 | 32 | -27 | 3 |